

# Avgerðir skulu takast
# ...og eg tori

Vit skulu menna Føroyar til at vera eitt áhugavert land hjá virkisfúsum fólki at byrja nýggja vinnu. Góðir vinnukarmar skulu tryggja eitt sunt og gott vinnulív, sum eisini skapar góðan trivnað til tann einstaka.

Míni aðalmál eru:

- Íverksetan og nýhugsan
- Útbúgving
- Smidligur og rúmligur arbeiðsmarknaður
- Virðilig eftirlønarskipan til øll

Les meira á kittymay.fo

KITTY MAY ELLEFSEN




# Leiðari til Snarskivuna

Søkt verður eftir leiðara til Snarskivuna.

## Snarskivan
Uppgávan hjá Snarskivuni er fyrst og fremst at veita eina góða tænastu til borgarar og starvsfólk. Snarskivan er avgreiðsla hjá fyrisitingunum, tað er Miðfyrisitingin, Tekniska fyrisiting og Trivnaðarfyrisiting. Í Snarskivuni er telefonmóttøka, avgreiðsla, journal, fólkayvirlit, byggitekniska økið og barnaansing.

## Arbeiðsuppgávur
Sum deildarleiðari hevur tú dagligu leiðsluni um hendi. Tín uppgáva er eisini at menna Snarskivuna soleiðis, at Snarskivan fylgir við tíðini og broytist samsvarandi uppgávubroytingini í kommununi. Tín uppgáva er eisini at vera við til at førleikamenna starvsfólkini.

Tórshavnar kommuna bjóðar eitt spennandi og dynamiskt arbeiðspláss við sjálvstøðugum, avbjóðandi og tværfakligum uppgávum. Góðir møguleikar eru fyri fakligari og persónligari menning.

## Førleikakrøv
Vit sóknast eftir einum deildarleiðara við 3 til 5 ára útbúgving (á bachelor- ella kandidatstøði) við viðkomandi royndum.

Góð samskiftisevni og góðir samstarvseginleikar eru ein fortreyt, eins og opinleiki fyri avbjóðingum og nýggjum møguleikum. Eisini er neyðugt við einum motiverandi leiðslustíli.

Vit hugsa okkum at tú dugir væl at samskifta bæði munnliga og skrivliga á føroyskum og munnliga á enskum, er framsíggin og framsøkin.

## Setanarviðurskifti
Starvið verður sett skjótast til ber og lønt í 35. lønarflokki sambært Tænastumannaavtaluni (uttan at vera tænastumannastarv) ella sambært avvarðandi sáttmála.

## Umsókn
saman við prógvum, viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi týsdagin 8. januar 2008 kl. 15.00. Merkið umsóknina „Deildarleiðari til Snarskivuna“.

## Meiri fæst at vita
um starvið við at venda sær til Bjørgfríð Ludvig, miðfyrisitingarstjóra, telefon 28 00 20 ella Janus Isfeldt, deildarleiðara, á telefon 21 03 30.

Tórshavnar kommuna